# Endar við at skipini verða løgd

**Fiskaseljarar stúra fyri gongdini, tí nú kann Fiskavirking fáa eina støðu, sum líkist monopoli. Sostatt versnar kappingin um fiskin alsamt og hetta kann enda við, at skipini verða løgd, sigur formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum**

FISKAPRÍSIR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ógvuliga óheppið.

Árni Joensen, formaður í ráfiskakeyparafelagnum, stúrir fyri gongdini í fiskivinnuni.

Ikki minst stúrir hann, nú Fiskasølan og Fiskavirking eru løgd saman.

Fiskasølan hevði tvey virki, sum keypti Fisk, eitt í Hvalba og eitt í Vági og tey vóru so í kapping við Fiskavirking.



*At fiskasølan og Fiskavirking eru løgd saman, ger at nú eru uppafturfærri at bjóða upp á fiskin og tað er ógvuliga óheppið, heldur formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum*

Men nú Fiskavirking eisini er komin at eiga tey bæði virkini, er ein hampiliga stórur fiskakeypari minni á marknaðinum at kappast um fiskin.

– Tað vóru fáir fiskakeyparar frammanundan. Nú er so ein hampiliga stórur fiskakeypari afturat farin av marknaðinum og tað fer uttan iva at gera kappingina um fiskin enn minni, tí nú er ein færri at bjóða uppá fiskin, sigur Árni Joensen.

Hann heldur, at hetta kann enda við, at Fiskavirking fær ein støðu ið líkist einum monopoli og tað er ikki fremjandi fyri kappingina um fiskin.

– Og sostatt eru okkara møguleikar at selja fiskin avmarkaðir rættiliga fitt.

### Tvingaðir at leggja skipini

Seinastu tíðina hevur politiski myndugleikin roynt at finna eina loysn sum forðar fyri, at so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

Í løtuni kunnu føroysk skip avreiða 25% av fiskinum uttanlands. Ein liður í royndunum at fáa meiri fisk upp á land í Føroyum, er at seta hendan markið niður til 10%.

Hetta vilja ráfiskakeypararnir ikki góðtaka.

Ráfiskakeyparar hava ført fram, at kappingin um fiskin er so lítil í Føroyum, at gera politikarar hetta, hava teir samstundis lagt skipini, tí tað kann flotin ikki liva við.

Og nú ein kappingarneyti er minni á føroyska marknaðinum, er hetta enn sannari enn tað var frammanundan, sigur formaðurin í ráfiskakeyparafelagnum.

Hann sigur, at fiskaseljarar kunnu prógva, at í Føroyum ber ikki til at selja nógv av tí upsanum, sum skipini fiska, tí ongin bjóðar uppá hann yvirhøvur.

Spurningurin, er, hvat politikarar vilja gera við ta støðuna. Skulu vit halda uppat fiska, ella skulu vit avreiða upsan til Havsbrún til djóraføði?

– Kunnu vit ikki sigla uttanlands í slíkum føri uttan at vera revsaðir, er onki val enn at leggja skipini. Tá verður støðan tann, at skip koma til lands við fullari last, sum tey ikki sleppa av við og so er onki at gera, uttan at binda tey við bryggju.

– Men so eru tað politikararnir, sum hava lagt skipini, sigur Árni Joensen.

# Vilja sleppa undan kapping um fiskin

**Framtaksgrunnurin vil sleppa undan kapping ímillum tvey dóttirfeløg um fiskin. Tað er ein orsøk til at Fiskavirking og Fiskasøluna skulu leggjast saman**

FISKASØLAN OG FRAMTAKSGRUNNURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Endamálið er at styrkja virksemið, so at søluvirðið økist og váðin hjá Framtaksgrunninum verður avmarkaður.



*Fiskasølan gongur ikki nóg væl og útlitini fyri framtíðini eru heldur ikki bjørt, sigur Framtaksgrunnurin*

Hetta er tann djúpara orsøkin til, at Framtaksgrunnurin nú hevur gjørt av at leggja Fiskasøluna og Fiskavirking saman.

Og tað verður Fiskavirking,sum heldur fram og Fiskasølan fer í søguna og tað verða nevnd og leiðsla í Fiskavirking, sum nú skulu stjórna øllum tí samanlagda felagnum.

Í tíðindaskrivi sigur Framtaksgrunnurin, at fíggjarliga gongdin hjá Fiskasøluni er als ikki nøktandi.

Fyrst í ár varð roknað við einum avlopi í ár, men síðst í oktober var framvegis talan um eitt munandi hall.

Framtaksgrunnurin metir somuleiðis, at raksturin hjá Fiskasøluni verður heldur ikki nøktandi frameftir.

Eitt nú verður eingin laksur úr Føroyum at fáa hjá laksavirkinum í Fuglafirði tá ið mai mánaði er komin.

Framtaksgrunnurin sigur, at skal Fiskasølan bøta um gongdina, noyðist felagið tískil at fara inn á sama virksemi, sum Fiskavirking er á. Sostatt noyðist Fiskasølan at gera íløgur í virki, sum virka botnfisk.

Hetta økir virksemið hjá Framtaksgrunninum í fiskivinnuni á landi, og tað ber eisini í sær kapping millum tvey dóttirfeløg hjá grunninum og tað vil Framtaksgrunnurin sleppa undan.

Grunnurin sigur eisini, at eftir samanleggingina, eru møguleikarnir hjá Fiskavirking at bøta um gongdina, fyrst og fremst at finna í útlendsku sølufeløgunum hjá Fiskasøluni í Fraklandi og Bretlandi, umframt í fiskavirkinum í Hirtshals.

Harumframt fer Fiskavirking nú eisini at eiga P/F Faroe Finance, ið fíggjar áogn.

– Í sambandi við samanleggingina er ætlanin at minkað munandi um samlaðu íløguna og harvið váðan hjá Framtaksgrunninum í nevndu feløgum. Partvís verður hetta gjørt við at útluta reiðan pening og partvís við at útluta partabrøv í feløgum, ið ikki hava beinleiðis tilknýti til kjarnuvirksemið hjá Føroya Fiskavirking frameftir, sigur Framtaksgrunnurin.

### Skal seljast sum ein eind

Annars leggur Framtaksgrunnurin dent á, at tá ið Fiskavirking verður seld, verður tað sum ein eind.

Samstundis fer Føroya Fiskavirking framhaldandi at gera tillagingar á teimum einstøku virkjunum við tí fyri eyga at bøta um sølumøguleikarnar, áðrenn eitt ítøkiligt søluarbeiði, verður gjørt.

Framtaksgrunnurin ger eisini greitt, at hann er sinnaður at samráðast um at selja øll partabrøv, sum grunnurin eigur, herundir eisini Føroya Fiskavirking, um nøktandi boð verður givið.

# Eli heldur fram

**Í Þorkeri er Eli Frederiksen afturvaldur til borgarstjóra í eitt fýra ára skeið afturat, men þorkenningar hava fingið nýggjan varaborgarstjóra**

BYGDARÁÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú hevur eisini bygdaráðið í Þorkeri skipað seg eftir kommunuvalið í farna mánaði.

Tað verður, sum væntað, Eli Frederiksen, ið heldur fram sum borgarstjóri.

Men Hans Eli Bech, ið hevur verið varaborgarstjóri, varð ikki afturvaldur. Ístaðin er tað nú Anna Djurhuus, ið varð vald til varaborgarstjóra.

Í bygdaráðnum í Þorkeri er ein nývaldur bygdaráðslimur. Tað er Mikkjal Sørensen, ið varð valdur fyri hera Danielsen, ið ikki stillaði uppaftur.

Bygdaráðið í Þorkeri hevur eisini gjørt fíggjarætlanina fyri komandi ár. Skattaprosentið er 21% og barnafrádrátturin er 3000 krónur og tað er tað sama sum í ár.

Inntøkan verður 6,7 milliónir næsta ár og tað er eitt vet hægri enn í ár.

Størsta einstaka útbyggingin í Þorkeri næsta ár, er Kirkjugarðurin, har 600.000 krónur eru settar av til útbygginginar.



*Soleiðis er nývalda bygdaráðið í Þorkeri mannað. Frá vinstru sita Sigmund Olsen, Hans Eli Bech, Mikkjal Sørensen, Eli Frederiksen, borgarstjóri og Anna Djurhuus, varaborgarstjóri*